

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 10 - 2011

# Risafund vert helvtina av oljugrunninum

Tað eru ørandi upphæddir vit tosa um, tá roknistykkið verður gjørt fyri nógv umrøddu Avaldsnes/Aldousfundini. Gigantfunnene gir halvt oljefond i skatteinntekter er ein av mongu yvirskriftunum í norskum miðlum í dag. Um inntøkan av fundinum við núverandi oljuprísi er góðar 2000 milliardir krónur ella 2 billiónir, so fara 78% ella 1500 milliardir av hesum inntøkum í norska landskassan tvs. í oljugrunnin. Hetta er helvtin av upphæddini, sum er í oljugrunninum í dag. Haraftrat kemur, at staturin eigur 100% av oljufelagnum Petoro umframt at vera størsti eigari í Statoil við 2/3. Harvið fær staturin enn meira í inntøkum enn tað, sum fæst í beinleiðis skatti frá oljufeløgunum. Hóast høga skattin so kunnu oljufeløgini kortini rokna sær risaupphæddir í inntøkum og forvinningi. Talan er um tvey sjálvstøðug loyvi men eitt og sama fund, annað Alvaldsnes og hitt Aldous. Statoil er fyristøðufelag við 40% í Aldous, Petoro eigur 30%, Det Norske Oljeselskab 20% og Lundin 10%. Goymslurnar í hesum fundinum eru mettar til 1 til 1,5 milliardir tunnur. Inntøkan av hesum verður hjá Statoil millum 50 og 80 milliardir eftir skatt. Parturin hjá Petoro verður millum 35 og 60 milliardir, og Det Norske Oljeselskab fær millum 25 og 40 milliardir. Loyvishavararnir í Avaldsnesfundinum fáa eisini nógv burtur úr. Lundin er fyristøðufelag við 40%, Statoil eigur 40% og Maersk 20%. Hetta fundið er mett til millum 1 og 1,8 milliard tunnur. Lundin fer at fáa burtur úr hesum millum 43 og 96 milliardir krónur eftir skatt. Sama fær Statoil. Maersk fær í sín part millum 21,5 og 48 milliardir krónur. Hetta talspælið gevur sjálvandi ikki eina fullkomna mynd, tí hon byggir á ein oljuprís uppá 109 dollarar. Hann kann broytast báðar vegir. Men kortini vísir hetta,hvussu øgilig tølini eru, tá eitt so stórt fund verður gjørt. Roknað verður við eini skjótari útbygging av báðum fundunum um somu tíð og kemur fyrsta oljan upp í 2017. Mynd Helge Lund,